## DAGSINS MEINING

# Kongsjørðin á privatar hendur

Fimmarin í útvarpinum fyrr í vikuni um hettar álvarsmál reisti áhugaverdar spurningar. Greitt er, at landbúnaðurin í Føroyum ikki fungerar optimalt í løtuni, so man kann vera partvís samdur við Bjarna Djurholm í diagnosuni, men tá tað kemur til medisinið, so fer BD skeivur. Sum fólkafloksmonnum líkt, so diskar hann upp við vidundurmedisininum, sum sambært fólkaflokkinum klárar allar samfelagsligar trupulleikar. Hetta vidundurmedisinið er privatisering, og tí skal kongsjørðin privatiserast.

Hví raksturin av føroyskum garðum skal gerast betur, tá bøndurnir fáa dalar og fjøll sum privata ogn, fæst ikki nakað svar uppá. Fíggingarmøguleikarnir gerast neyvan betur, tí sum er hava teir ivaleyst verið í so góðir gjøgnum Jarðarráðið.

Alt annað líka, so verður raksturin tyngri við einari øktari lánibyrðu til keyp av kongsjørðini. Einasti máti, hettar ikki er tilfeldið, er um kongsjørðin — skattgjaldarans ogn - verður forerd burtur fyri lítið og lætt.

Sagt hevur verið, at um nýtsluvirðið á kongsjørðini er lægri enn skuldin í einum garði, so verður skuldin niðurskrivað til nýtsluvirðið. Við øðrum orðum fáa teir bøndur, ið hava nógva skuld, jørðina forerandi og fáa avskrivað skuld omaná. Hettar er fólkafloks-privatisering, tá hon er allarbest. Teir bøndur, ið lítla ella onga skuld hava í dag, mugu gjalda fyri sína jørð, og harvið tyngja raksturin av garðinum, meðan teir, ið hava lænt seg út á sjógv fáa eftir øllum at døma jørðina pluss skuldarsanering.

Tað verður sagt, at bøndurnir ikki skulu kunna fáa vinning burtur úr eitt nú sølu av jørð, tí man fær ein búnaðargrunn ella búnaðarbanka. Tað kann væl verða, at hettar er støðan júst nú. Hvussu verður um 10 ár, fyri ikki at tala um eitt ættarlið? Tað vísir seg at vera eitt serføroyskt eyðkenni — serliga kent frá fiskivinnuni, at menn gloyma, at skattgjaldarin eigur lívið í teimum.

Hvussu við fornminnum? Tað kann væl verða, at friðingarlógin er galdandi yvir privatari ogn eisini, men hvør skal eiga? Hvør fer at standa og krevja atgongumerki?

Nú er tørvur á, at allar góðar kreftir at siga sína hugsan um hetta. Hvat sigur Tjóðveldisflokkurin? Tekur hann undir við at avreiða fólksins ogn á nakrar fáar hendur — hví ikki tosa við vinstravongin í Løgtinginum um ein landbúnaðarreform, ið ikki inniber forering av landsins ognum. Er hetta ikki nakað, sum Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin náttúrliga áttu at kunnað samst um! Vit fáa at síggja, hvussu leikur fer.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Johan Johansen farin



Mánadagin 19. mars andaðist Johan Johansen, fyrrv. fulltrúi á Fútaskrivstovuni.

Johan var føddur í Klaksvík 3. september 1914 og var 86 ár, nú hann legði frá sær.

Áðrenn Johan flutti til Havnar, hevði hann verið í handlinum hjá Clæmint Isaksen og á sýsluskrivstovuni í Klaksvík.

Í 1941 varð heitt á hann um at koma á Fútaskrivstovuna, og hetta beliv lívsstarv hansara – í 43 ár. Hann legði frá sær fyri aldur í 1984.

Mia og Johan áttu børnini Sonnu og Jógvan, og bústaðurin var á Abbatrøð, í barnaheiminum hjá Miu, í húsum gamla Jógvans Waagstein – og tað fer at vera vert at nevna, at Johan rættuliga skjótt lagaði seg eftir tí umhvørvi, har var. Evnini mugu hava verið framúr, tí fáur hevur tikið størri lut í tónleikalívi, tí gerandisliga, tí neyðuga, sum hann við trúgva luti sínum sum urguleikari í Havnar Kirkju, har hann tók eftir, tá konan Mia meira og minni slepti – og álitið var hann á Landssjúkrahúsinum og í kirkjugarðinum, tá brúk var fyri urguleikara í kapellinum.

Hetta vóru neyðugar uppgávur, hann røkti fram í 80 árini.

Nú kreftirnar gingu undan, og megin sveik, var neyðugt hjá Johan at vera undir umsorgan á Landssjúkrahúsinum – og síðani nýárið 2000 hevur Mia havt sín bústað á Ellisheiminum.

Frið lýsa vit yvir minnið um heiðursmannin Johan Johansen, fyrrverandi skrivstovufulltrúa.

**jl**

### Eyðun Elttør 60 ár



Í dag 23. mars fyllur landsstýrismaðurin í Olju- og Umhvørvismálum, Eyðun Elttør 60 ár.

Eyðun er føddur 23. mars 1941 í Klaksvík, sonur Ellu og Eli Elttør, og har hevur hann verið búsitandi síðani.

Hann er giftur Oddbjørg, dóttur Emmu og Sam Jacobsen, eisini úr Klaksvík, og eiga tey saman dreingirnar Stig, Elian, Rúna og Eyðstein.

Eyðun hevur saman við familju síni verið sera virkin innan Brøðrasamkomuna og er kendur sum ein góður røðari.

Eyðun fekk sær sum ungur útbúgving sum maskinmeistari og sigldi fyrst í eina tíð sum maskinmaður. Hann hevur arbeitt sum maskinmaður hjá SEV og hevur verið eftirlitsmaður hjá Arbeiðseftirlitinum, har hann eisini hevur fingist við skeiðvirksemi.

Eyðun hevur altíð havt politiskan áhuga og hevur heilt frá ungum árum verið tjóðskaparsinnaður.

Hann bleiv av álvara kendur, tá hann í mai 1998 trein inn á politiska pallin sum landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum vegna Sjálvstýrisflokkin.

Tað er ikki bert á myndum í visuellu fjølmiðlunum, at Eyðun er ein smílandi maður, hann er av lyndi ein blídligur, fyrikomandi og smílandi maður.

Hjartaliga tillukku við tí runda degnum Eyðun.

**Spg**

# Bøturnar hjálpa ikki

FERÐSLA
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Steðgi- og parkeringsviðurskiftini við skúlarnar í høvuðsstaðarøkinum eru eitt afturvendandi evni. Hvønn morgun eru børn í lívsvanda av ólógligum steðgi, yvirháling og parkeraðum bilum við høvuðsljósum tendraðum. Løgreglan heldur, at fleiri fysiskar broytingar mugu verða gjørdar í fleiri støðum, áðrenn viðurskiftini kunnu fáast toluliga í rættlag.

Bøtur í hundraðtali eru skrivaðar við skúlarnar. Men hetta tykist ikki at hjálpa.




## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Súsanna Hentze**

doyði og varð jarðað.
Takk fyri blómur, kransar, uppringingar og gávur til kirkjuna. Takk til gravarar, sangarar, urguspælara og prest fyri góð orð í heiminum og í kirkjuni. Takk til manningina og Sildberanum fyri beinasemi, og takk øll tit, sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Vónbjørt, Meinhard, Sveinbjørn og Óluva**



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Kann ikki góðtakast

**Tað kann ikki góðtakast, at fólk skulu noyðast at bíða í meiri enn eitt ár eftir svari upp á umsóknir um hjálp frá Hjálpartólamiðstøðini og Almannastovuni, sigur Sámal Petur í Grund Landsstýrismaður**

ALMANNAVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*

– Tað kann ikki góðtakast, at tað skal taka mánaðir og ár hjá Hjálpartólamiðstøðini og Almannastovuni at avgreiða umsóknir frá fólki um hjálp.

Tað sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Í Sosialinum mikudagin høvdu vit eina drúgva grein um, hvussu ómetaliga illa Almannaverkið í Føroyum riggaði og hvussu seint tað gekk at fáa hjálp frá Hjálpartólamiðstøðini og Alannastovuni.

Vit høvdu samrøðu við Odd Eið í Porkeri, sum hevur sitið í rullustóli í skjótt 11 ár.

Hann hevur so ringar royndir av Almannaverkinum, at hann føldi tað líka nógv sum stein omaná byrðu, sum eina hjálp. Og hann segði, at var hann ikki so sálarliga sterkur, hevði hann langt síðani havt givið upp.

### Er ikki nøktandi

Sámal Petur í Grund, nýggjur Landsstýrismaður í almannamálum, sigur, at tað er ikki ókent, at tað skal meiri enn gott tol at hava hava við Almannastovuna og Hjálpartólamiðstøðina at at gea.

– Vit vita at skipanin er ómetaliga stirvin: Søgan um Odd Eið er ikki eindømi, tí tað er nógv mál av hasum slagnum.

Hann sigur, at støðan kann ikki góðtakast og at tað er sjálvsagt, at vit mugu royna at finna greiðari og lættari mannagongdir.

– Onkur stig eru tikin men langt er eftir á mál. Eitt nú er tað ikki langt síðani, at vit broyttu mannagongdina, so at nú skal Hjálpartólamiðstøðin ikki longur skal hava mál endaliga góðkend í Fíggjarmálastýrinum.

– Hetta varð gjørt fyri at fáa eina greiðari mannagongd. Men tá varð eisini ført fram í tinginum, at skipanin var alt ov stirvin.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann hevur víst Almannastovuni á, at mannagongdin er ov stirvin og hann sigur, at Almannastovan hevur í eina tíð arbeitt við at gera skipanina liðiligari og arbeiðsgongdirnar greiðari.

– Tað er neyðugt at viðgerðin gongur skjótari, tí tað er ósømiligt at tað skal taka so drúgva tíð. Ofta er talan um fólk, sum eru heilt bundin at hjálpini, tey fáa. Og hjá summum er tað enntá alneyðugt at fáa eina skjóta viðgerð, eitt nú hjá fólki, sum krevja til likamligar uppvenjingar fyri at koma fyri seg aftur.

– Øll skulu hava eina skjóta og góða viðgerð. Men tað ber heldur ikki til at skrumbla mál ígjøgmum, tí málini skulu eisini hava eina rætta viðgerð, og tað tekur eisini tíð.

*– Øll skulu hava skjóta og góða viðgerð frá Almannastovuni og Hjálpartólamiðstøðini. Mannagongdirnar, vit nú hava, eru alt ov stirvnar og ógreiðar, tað er søgan um Odd Eið í Sosialinum mikudagin eitt talandi dømi um, heldur Sámal Petur í Grund, Landsstýrismaður í Almannamálum*



### Avmarkaðar møguleikar

Sámal Petur í grund sigur, at søgan um Odd Eið eigur at verða eitt talandi dømi um álvaran í málinum.

Men spurningurin er, hvat hann kann gera, umframt at vísa Almannastovuni á, at tað er ov stirvið. Hann væntar tó, at tað fer at bøta um støðuna, tá ið Almannastovan er liðug við arbeiðið at leggja arbeiðsgongdina um.

Hann sigur hinvegin, at tað er avmarkað, hvat Almanna- og Heilsumálastýrið sjálvt kan gera við málið, tí har eru tey so illa mannað.

– Hartil eru fleiri størv ósett, so tað er avmarkað, hvat vit fáa gjørt.

Hann heldur tó, at dømi sum tað um Odd Eið, og onnur við, kunnu brúkast positivt til at bøta um støðuna.

– Eitt nú ber tað til at gjøgnumganga slík greflig dømi úr enda í annað og fáa greiðu á, hvar knútarnir í skipanini eru og hví, og hvar, málið steðgaði.

Annars vísir Sámal Petur í Grund á, at ein trupulleiki er, at bæði Almannastovan og Hjálpartólamiðstøðin eru so illa mannað, at tey tí ikki fáa arbeitt so væl, sum tey áttu.

– Men støðan er tíverri tann sama á Almanna- og Heilsumálastýrinum, at tað er avmarkað, hvat annað,vit fáa gjørt beint nú fyri at bøta um støðuna.

Sámal Petur í Grund sigur, at uppgávurnar, sum Almannaverkið hevur, eru so ómetaliga stórar.

Almannaverkið og Heilsuverkið umsita áleið 1,5 milliard um árið, og tað er helvtin av fíggjarlógini. Og afturmóti, hvussu onnur stýri eru mannað, eru tað ómetaliga fá fólk í Almanna- og Heilsumálastýrinum at umsita so stórar upphæddir, so arbeiðstrýstið á hvørjum einstakum er sera stórt, sigur Landsstýrismaðurin í Almannamálum.

# Nýggi Smyril helst samtyktur týsdagin

**Ein grundgeving fyri at tað ikki ber til at taka av tilmælinum hjá serfrøðinganevndini um, hvussu nýggja suðuroyarskipið skal síggja út, er, at so sleppur tað ikki í dokk á Skála!**

SUÐUROYARLEIÐIN
*Áki Bertholdsen*

Tað er nú nogv, sum bendir á, at landsstýrið týsdagin fer at gera av, hvussu tað nýggja suðuroyarskipið skal síggja út.

Fíggjarmálastýrið er nú í ferð við at gera ymsar útrokningar um skipið av nýggjum. 240 milliónir eru settar av á langtíðarfíggjarætlanini til nýtt Suðuroyarskip og tað, sum Fíggjarmálastýrið nú skal rokna út, er,m.a, hvussu tað fer at ávirka langtíðarfíggjarætlanina og íløgukarmarnar, um skipið kostar meiri.

Tað eru ymisk uppskot á borðinum um, hvussu skipið skal síggja út.

Vælvitandi keldur hava upplýst fyri Sosialinum, at skipið, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur mælt Landsstýrinum til at byggja, siglur 19 míl og er 121 metrar langt. Hetta skipið kostar 275 milliónir.

Men hetta er ikki í samsvari við tilmælið frá teirri serkønu nevndin, ið hevur fyrireikað byggingina.

Nevndin hevur verið mannað við teknisku og umsitingarligu leiðsluni á Strandferðsluni, umboðum fyri manningini á Smyrli og umboðum fyri tey, ið skulu brúka skipið, nevniliga kommunurnar og vinnulívið í Suðuroynni.

Saman við danska projekteringsfelagnum, Knud E. Hansen, eru nevndin komin fram til, at tann besta loysnin er at byggja eitt skip, sum kostar 305 milliónir og sum siglur 21 míl. Hetta skipið er nakrar metrar longri enn tað, sum Bjarni Djurholm mælir til, tí ferð og longd fylgjast at í vissan mun.

Men hetta sama skipið kann eisini byggjast í Kina fyri 255 milliónir, tá er íroknað at tveir mans frá projekteringsfelagnum eru á skipasmiðjuni í allari byggitíðini og hava eftirlitið við arbeiðnum.

Hetta skipið gongur við tungolju og er bíligari í rakstri enn Smyril nú er. Hetta skipið er eisini longu teknað. Tað er teknað í sama sniðið sum verjuskipið Triton, ið er eitt av bera gott sjóskip.

Skipið, sum Bjarni Djurholm mælir til, er ikki projekterað ella teknað, so tann kostnaðurin skal leggjast afturat teimum 275 milliónunum, so tað er næstan ongin munur á skipunum.

Men hetta er einasta skipið, har tað ber til at sigla fýra ferðir ímillum Suðuroynna og Havnina, um tað skuldi gjørst neyðugt einaferð í framtíðini.

### Ikki semja í Landsstýrinum

Tað gongst ill at fáa nakað at vita um viðgerðina í Landsstýrinum.

Bjarni Djurolm úr fólkaflokkinum vil onki siga um, hvat tilmæli, hann hevur lagt fyri Landsstýrið. Høgni Hoydal úr tjóðveldisflokkinum og Sámal Petur í Grund úr sjálvstýrisflokkinum, hava heldur ongar viðmerkingar.

Men tað skilst frá vælvitandi keldum, at tjóðveldisflokkurin heldur, at tað er ongin meining í at hava havt eina nevnd av serkønum sitandi í hálvtannað ár og arbeitt við málinum og so at skúgvað tilmælið frá henni til viks, tá ið hon vísir á loysnina, sum er best egnað. Tí tekur tjóðveldisflokkurin undir við at byggja eitt skipið, sum fyrireikingarnevndin hevur mælir til.

Fólkaflokkurin tekur undir við tilmælinum frá landsstýrismanninum í vinnumálum og Sjálvstýrisflokkurin hellir somuleiðis tann vegin.

Ein orsøk til partar av landsstýrinum halda, at skipið kann ikki vera longri enn 121 metrar, er, at so sleppur tað ikki í dokk á Skála. Tað halda aðrir er ongin haldgóð grundgeving. Tað er ikki óvanligt, at skip fara í dokk aðrastaðni og tað er heldur ongin, sum sigur, at dokkin á Skála ikki verður útbygt.

Tað eru eisini teir politikarar, sum ikki skilja, hví tað skal vera slíkur tvídráttur um eitt suðuroyarskip, tá ið tað er alment góðtikið, uttan at blunka, at farast skal undir undirsjóvartunnil til Klaksvíkar fyri somu upphædd.

Málið um nýggjan Smyril er á skránni fyri landsstýrisfundin týsdagin og tá verður vætnað, at tað kann avgreiðast.




*Í 2005 sleppur Smyril ikki at sigla longur, uttan at stórar ábøtur verða gjørdar á hann. Tá skal annað skip verða klárt at seta í rutu. Men enn er tvídráttur um, hvussu tað skal síggja út*